# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## 24 TÍMAR VIÐ BAUER

Ein væl umtókt sjónvarpsøð úr USA seinastu árini hevur verið 24 tímar, har Kiefer Sutherland spælir Jack Bauer, sum skal so ræðuliga nógv ígjøgnum upp á ein dag. Nú fæst seinasta sesongin við 24 tímum á dvd, og hesaferð er spenningurin minst líka stórur sum vanligt, og Jack Bauer skal veruliga spíla seg út fyri at klára skerini.

**24 TÍMAR**
dvd-boks



## MCBIRNIE AFTUR Á SLÓÐINA

Tað eru liðin meira enn 50 ár, síðani Robert McBirnie framførdi alment fyrstu ferð. Hesa hálva øldina síðani hevur hann verið virkin sum tónleikari og undirhaldari. Fyri kortum gav hann savnsfløgu út við tónleiki frá seinastu 50 árunum, og í kvøld hevur hann konsert í Sjónleikarahúsinum í Havn. Tað var har, at hann og Faroboys av álvara fingu gjøgnumbrot fyri nógvum árum síðani.

**ROBERT MCBIRNIE**
Sjónleikarhúsið í Havn
Fríggjakvøldið 25/2 kl. 21.00




## TV-2 VIÐ NÝGGJARI FLØGU

Tað eru liðin 30 ár, síðani danski poppbólkurin TV-2 gav sína fyrstu fløgu út, og nú er bólkurin úr Aarhus akutellur við nýggjari fløgu – Showtime. Sum vanligt hevur Steffen Brand skrivað sangirnar, og hesaferð hevur framleiðarin Thomas Troelsen lagt tónleikin til rættis. Hóast hann førkar TV-2 poppvegin, so missa popparnir seg ikki burtur – og teir góðu TV-2 sangirnir eru framvegis at finna á hesi útgávuni.

**TV-2**
Showtime




## HVONN LIVE LEYGARKVØLDIÐ

Rás2 bjóðar leygarkvøldið enn eina Hvonn Live sending. Hetta er sending, sum verður send beinleiðis av Hvonn í Havn. Fólk eru væl komin á Hvonn at lurta, og tað ber eisini til at hoyra alt á Rás2. Gestir hesaferð verða Jan Pytlick, landsliðsvenjari hjá donsku hondbóltskvinunum, Óli Breckmann og Torbjørn Jacobsen, politikarar, og so vitja eisini tríggjar kvinnur, sum á føroyskari heimasíðu siga sína hugsan um sexleikur. Terji Rasmussen fer at spæla Føstufressa-sangir live.

**HVONN LIVE**
Leygarkvøldið 26/2 kl. 20-22




## STEYPAFINALA Í ONGLANDI

Sunnudagin verður finalan í minni ensku steypakappingini, Carling Cup. Tvey feløg úr Premier League – og teimum báðu størstu ensku býunum - eru komin í finaluna hesaferð. Arsenal skal dystast við Birmingham á Wembley í London, og vinnarin av dystinum kann kalla seg steypavinnara og kann tryggja sær pláss í europeiskum fótbólti næsta kappingarár.

**ARSENAL-BIRMINGHAM**
Carling Cup finala
Sunnudagin 27/2 kl. 16.00.



## AMARIEL Í FOCUS

Í dag letur listamaðurin Amariel Norðoy upp framsýning í Galerie Focus í Havn. Seinastu árini hevur Amariel arbeitt nógv við tema'inum Útróðrarbørn, og tað sæst eisini aftur í nýggju framsýningini. Framsýningin lat upp fríggjadagin og er opin fram til 10. mars.

**AMARIEL NORÐOY**
Galerie Focus í Havn
25/2-10/3